# Hjálpt Kaj Leo í eitt ár



**Eg eri ikki spinndoktari hjá Kaj Leo. Eg eri kunningarráðgevi hjá løgmanni. Soleiðis greiðir nærmasti ráðgevi løgmans frá sínum starvi. Tú kennir helst ikki navnið, men Páll Nolsøe hevur á nógvum myndum staðið beint aftanfyri Kaj Leo Johannesen, sum í morgin hevur verið løgmaður í eitt ár**

## Embætisfólk



**Eirikur í Jákupsstovu**
eij@sosialurin.fo

Seinastu nógvu árini er orðið spinndoktari nýtt øgiliga nógv. Tony Blair hevði nokk ongantíð komið til valdið, um hann ikki hevði sín. Í Danmark ganga teir upp á skift millum ymiskar politikarar og í Føroyum eru eisini nøkur, sum virka sum spinndoktarar, men maðurin beint aftanfyri Kaj Leo Johannesen, sær ikki seg sjálvan sum nakran spinndoktara.

– Eg eri ikki spinndoktari hjá Kaj Leo. Eg eri kunningarráðgevi hjá løgmanni. Heitið verður vanliga nýtt um persónligar ráðgevar hjá politikarum, sum eru partapolitisk settir og sum koma og fara við tí einstaka ministaranum. Orsøkin til, at eg ikki er spinndoktari, er tí eg fylgi við løgmansembætinum og ikki við persóninum. Eg skal sum øll onnur embætisfólk í landsfyrisitingini vera partapolitisk óheftur í mínum starvi. Hetta merkir millum annað, at tá Kaj Leo Johannesen er floksformaður og ikki løgmaður, tá havi eg onki við hann at gera. Eg skal formidla politikk, ikki skapa hann, staðfestir Páll Nolsøe, sum eisini var ráðgevi hjá Jóannes Eidesgaard í eina tíð, áðrenn eitt ávíst lás á eini ávísari hurð kom upp í leikin.

### Avmarkað stýring

Páll Nolsøe staðfestir eisini, at tað ikki er hansara uppgáva at beinleiðis stýra løgmanni.

– Eg eri nógv meira ein sparringspartnari, so løgmaður fær møguleika at tosað um nøkur ting, áðrenn hann fer víðari við teimum, greiðir ráðgevin frá.

Men tað er eftir hondini almenn fatan, at Kaj Leo Johannesen dugir betur at tosa í dag, enn fyri einum ári síðan, men hetta heldur Páll Nolsøe seg ikki hava havt beinleiðis ávirkan á.

– Løgmaður dugir helst betur í dag. Tað hoyrir mann fólk siga, men eg haldi ikki tað er nakað vit beinleiðis hava gjørt, men sjálvandi verður hann ílatin fakliga. Vit kunnu ikki geva honum eitt manuskript, tí tað høvdu øll lagt til merkis, men vit kunnu gera annað. Tá vit tosa saman, so er tað um vinkulin, hvussu løgmaður kundi hugsast at svara, tí ein fyrireiking verður altíð gjørd. Viðvíkjandi úttalilsunum haldi eg, at tað mest eru royndirnar, sum gera mun fyri løgmann í dag, sigur Páll Nolsøe.

*– Óansæð hvønn eg tosi við, má eg ansa eftir, at eg ikki sigi nakað, sum ikki kann endurtakast alment*

Víðari greiðir hann frá, at hann ongantíð hevur følt, at Kaj Leo Johannesen hevur verið pínligur.

– Tað er meira soleiðis, at eg onkuntíð havi hugsað, at tingini kundu verið søgd eitt sindur øðrvísi. Men soleiðis vil tað altíð verða. Øll menniskju kunnu orða seg illa ella skeivt, eisini politikarar. Og tað er heldur ikki vist, at tað gongur út yvir trúvirðið, heldur tvørturímóti, heldur Páll Nolsøe

– Politisk kommunikatión er sjálvdan spektakuler og ikki sum ein fótbóltsdystur, sum kann avgerast eftir einum sekundi við einum skoti. Politisk kommunikatión er meira sum súkklukapping við sum Tour de France har tað snýr seg meira um at leggja eina ætlan, vera áhaldin og seta spurtin inn røttu løtuna, sigur ráðgevin.

### Løgmaður avger

Ráðgevin hjá løgmanni staðfestir eisini, at tað ikki er hann, sum avger, um og hvussu løgmaður úttalar seg til miðlarnar.

– Hinvegin verði eg brúktur at tosa við, áðrenn løgmaður sigur nakað, um hann ivast, greiðir Páll Nolsøe frá.

– Kaj Leo vil næstan altíð úttala seg, og tað blandi eg meg sum so ikki uppí. Politikarar eiga at úttala seg, ella sum fyrrverandi spinndoktarin hjá Anders Fogh Rasmussen orðað tað: Hvad der ikke kan forklares – kan ikke forsvares.

Víðari greiðir hann frá, at tað einaferð um vikuna eru støðufundir á løgmansskrivstovuni, og har gongur tað fyri seg á sama hátt. Løgmaður hevur seinasta orðið.

– Men tað merkir tó ikki, at eg ikki onkuntíð priki løgmann á ryggin, um eg til dømis haldi, at hann eigur at fara í miðlarnar við einum máli, tí sum embætisfólk skalt tú vera loyalur móti politisku leiðsluni og tað merkir, at tú eigur at gera vart við tíni fakligu sjónarmið, sigur Páll Nolsøe.

### Fittur fýrur

Tað fyrsta Páll Nolsøe sigur, tá spurt verður um, hvussu løgmaður er, liggur tætt saman við háttinum, vit onnur kenna løgmann.

– Hann er ein fittur fýrur. Eisini er hann bjartskygdur av lyndi, og í hesum tíðum er tað ikki neiligt útfrá einum samskiftisligum sjónarhorni, heldur nærmasti ráðgevin.

Tó leggur hann afturat.

– Eg havi hoyrt frá onkrum, at mann bara einaferð kemur ov seint til ein fund við Kaj Leo, men tað havi eg ikki roynt, vísir Páll Nolsøe á.

### Munur á løgmonnum

Páll Nolsøe hevur verið ráðgevi hjá bæði Jóannes Eidesgaard, tá hann var løgmaður, og hjá Kaj Leo Johannesen, sum er løgmaður í dag.

– Tað er munur á teimum báðum. Jóannes Eidesgaard hevði eina rúgvu av royndum úr landsstýrinum og hevði sitið í fleiri ymiskum landsstýrismannasessum, áðrenn eg byrjaði at arbeiða saman við honum. Kaj Leo Johannesen hevði ikki sitið í landsstýrinum fyrr, greiðir Páll Nolsøe frá.

Hann leggur afturat, at teir báðir løgmenninir hava stóran áhuga í ítrótti, har Kaj Leo Johannesen serliga hevur áhuga fyri fótbólti, meðan Jóannes Eidesgaard heldur nýtir kappróður til sínar myndir.

– Hatta vita fólk helst, tí teir brúka ítróttirnar í málinum, heldur Páll Nolsøe.

### Ítróttarmál

Felags fyri Kaj Leo Johannesen og Páll Nolsøe er, at teir báðir brúka sera nógvar ítróttarvendingar.

– Fólk halda, at løgmaður nýtur fleiri ítróttarvendingar enn onnur, men tað haldi eg ikki bilar. Tí ítróttarvendingar eru ofta góðar einfaldar myndir um veruleikan. Tað er eisini soleiðis løgmaður vil vera. Hann nýtir rættiligt gerandismál og tann stýlin klæðir hann eisini væl, metir Páll Nolsøe.

*– Fólk halda, at løgmaður nýtur fleiri ítróttarvendingar enn onnur, men tað haldi eg ikki bilar. Hinvegin eru ítróttarvendingar ofta góðar einfaldar myndir um veruleikan*

### Alt endurtakast

Kunningarráðgevi løgmans má eisini ansa væl eftir, hvat hann sigur, tá hann tosar við fjølmiðlarnar, tí hvørt einasta orð, ið ráðgevin nýtir, skal kunna endurgevast.

– Óansæð hvønn eg tosi við, so royni eg at ansa eftir, at

## Fakta

**Navn:** Páll Nolsøe
**Útbúgving:** Cand com. Søgu samskifti á RUC
**Føðidagur:** 26. novembur 1976
**Foreldur:** Axel H. Nolsøe og Lena Nolsøe
**Føðistaður:** Keypmannahavn
**Unnusta:** Barbara S. Berg
**Børn:** Vera 2006 og Ella 2008